

## Mørkøre venur nú Averøykameratene

Kurt Mørkøre hevur fingið nýtt venjarastarv. Hann skal standa á odda fyri Averøykameratene, sum spælir í fjórðbestu deildini í Noregi, í 2011. Fyrrverandi landsliðsleikarin hevur seinastu tvey árini verið venjari hjá Elnesvågen. Hann gleðir seg til uppgávuna.

Umstøðurnar eru betri og meira seriøsar her enn í Elnesvågen, so tað verður spennandi, sigur Kurt Mørkøre við heimasíðuna hjá Averøykameratene.

Kurt Mørkøre hevur eisini verið venjari hjá KÍ og B36.

# StÍF steðgaði fullkomiliga upp

**HONDBÓLTUR**

### Tríggir dystir vóru í bestu mansdeildini í gjár

Uni Holm Johannesen

StÍF fekk einki mál seinastu 11 minuttirnar, og Neistin setti ferðina av álvara upp.

Heimaliðið var annars við yvirlutan so at siga allatíð. StÍF hevði beina kós móti stigunum í hálvleikinum, tá munurin var fimm mál.

Aftaná hvíldina hóttu gestirnir, og seinastu minuttirnar steðgaði fullkomiliga upp hjá heimaliðnum.

StÍF var á odda 27-24, tá 11 minuttir restaðu í. Neistin vann 28-27.

Leivur Justinussen og Marius Joensen skutu flest mál fyri StÍF. Teir fingu seks mál hvør.

41 ára gamli Ingi Olsen var aftur eyðsýndur hesaferð. Hann og Hanus Hanusarsson vóru toppskjúttar við seks málum.



*Bláu føroyameistararnir úr Neistanum, vundu burturúr strandingum*

### H71 vann

H71 vann tvey kærkomin stig seinnapartin, tá hoyvíkingar vitjaðu Kyndil í høllini á Hálsi. Úrslitið var 19-24.

Tað var fyrstu løtuna aftaná steðgin, at lítið veiggj var í heimaliðnum. Kyndil var á odda 12-9 í hálvleikinum, men fingu ikki mál aftur, fyrr enn 13 minuttir vóru spældir av seinna hálvleikinum.

Tá vóru gestirnir framman fyri trimum málum. Kyndil hótti ongantíð leiðsluna.



*KÍF fekk eina stigi í Vestmanna*

Hans Áki Dal-Christiansen, Kyndil, og Bogdan Florea, H71, vóru toppskjúttar við seks málum.

### Javnleikur í Vestmanna

VÍF og KÍF býttu stigini millum sín, tá liðini hittust í Vestmanna seinnapartin. Vestmenningar og kollfirðingarnir togaðust so hvørt um leiðsluna, og tá avtornaði var úrslitið 25-25.

Tað sá hinvegin einki út hjá gestunum úr Kollafirði, tá sjey minuttir restaðu í. Tá var heimaliðið á odda 24-21.

Áki G. Olsen, VÍF, var toppskjútti við átta málum. Ási Dam skeyt flest mál fyri KÍF. Hann fekk sjey mál.

*uni@sosialurin.fo*



*Hoyvíkingar vunnu kærkomnan sigur á Kyndli*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

## ATLANTIC-AIRWAYS DEILDIN:

### StÍF - Neistin 27-28 (18-13)

Dómarar: Dánjal Samuelsen og Heri Petersen
**10 min.: 4-5**
**20 min.: 13-10**
**40 min.: 22-20**
**50 min.: 27-24**

**StÍF:** Leivur Justinussen 6, Marius Joensen 6, Jóanes Prestá 5, Jørmund Joensen 4, Høgni Jensen 3, Jógvan Berg 3.
**Neistin:** Ingi Olsen 6, Heini Hanusarson 6, David Edvardsen 5 (5), Finnur Hansson 5, Jón Ludvík 3, Rósing Rasmussen 2, Sjúrður Thomassen 1.
Útvísingar: StÍF 6 – Neistin 5

### VÍF - KÍF 25-25 (13-10)

**Dómarar: Ragnar Simonsen og Rúni Mohr**
**10 min.: 2-2**
**20 min.: 7-7**
**40 min.: 17-16**
**50 min.: 22-20**

**VÍF:** Áki G. Olsen 8 (1), Rúni Fossdal 4, Jákup Suni Andreasen 3, Magnus á Rógvi 2, Joen Pauli Høgnesen 2, Andreas Eriksen 2, Jákup Andreas Joensen 2, Sámal Jákup Djurhuus 1.
**KÍF:** Ási Dam 7 (1), Andrias Nielsen 5, Regin Petersen 4, Teitur Joensen 4, Tony Weihe 2, Pætur Johannesen 1, Ingi Johannesen 1, Suni Johannesen 1.
Útvísingar: VÍF 6 - KÍF 7

### Kyndil - H71 19-24 (12-9)

Dómarar: Sámal Paulason og Kári Hansen
**10 min.: 4-3**
**20 min.: 8-6**
**40 min.: 12-15**
**50 min.: 15-20**

**Kyndil:** Hans Áki Dal-Christiansen 6 (1), Høgni Klein-Olsen 4, Hans Arni B. Thomsen 3, Josef Abrahamsen 3, Bárður Johannesen 2, Rani Ellingsgaard 1.
**H71:** Bogdan Florea 6, Esbern Patursson 5, Dánjal Tórgarð 4 (1), Bogi Davidsen 2, Ári J. Olsen 2, Poul Kjartan Dam 2, Tróndur Vatnhamar 2, Rógvi Sørensen 1.

# Avgreiðsluspurningur í Havn

**HONDBÓLTUR**

### Tjaldur vann greitt í høllini á Hálsi móti Kyndli

Uni Holm Johannesen

Tað var bara ein spurningur um, hvussu stórur sigurin skuldi verða, tá Kyndil og Tjaldur spældi í høllini á Hálsi seinnapartin.

Gestirnir úr Runavík vunnu 34-17. Hálvleiksstøðan var 17-8 til Tjaldur.

Tað skrædnaði millum liðini beinanvegin, og hóast heimaliðið royndi at stríðast sum frægast, so hótti Kyndil ongantíð leiðsluna.

Heidi Maria Akselsen skeyt flest mál fyri heimaliðið. Hon fekk 8 mál.

Adina Petrea, Tjaldur, var toppskjútti við 10 málum.

## SUNSET-DEILDIN:

**Kyndil – Tjaldur 18-34 (8-17)**
**Dómarar: Sámal Paulason og Kári Hansen**
**10 min.: 1-5**
**20 min.: 5-9**
**40 min.: 9-20**
**50 min.: 16-28**

**Kyndil:** Heidi Maria Akselsen 7 (1), Randi S. Wardum 3, Guðrið G. Eystberg 2 (1), Jórun Ludvig, Anja Heinadóttir 2, Turið Arge 1, Bjarta Johansen 1.
**Tjaldur:** Adina Petra 10 (1), Annika Thomsen 7, Cornelia Rimbu 5, Simona Petersen 4, Jóhanna í Króki 4, Sarah Ann Thomsen 2, Benadikta Johannesen 1, Eyð Jacobsen